# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Høvdu veljararnir í Iowa vitað, at John Edwards hevði verið ótrúgvur, hevði Hillary Clinton verið valevni*

*Clinton-ráðgevi*

# Georgia setir føtur í spenni

**Russland og Georgia eru samd um eina vápnahvíld, men Georgia vil ikki lata Suðurossetia og Abkhasia frá sær**



*Franski forsetin, Nicolas Sarkozy, og georgiski forsetin, Mikhail Saakashvili, greiða tíðindafólki frá friðaravtaluni*
*Mynd: Polfoto*

- Vit hava eina avtalu, sum er góðkend í Moskva og Tblisi, segði franski forsetin, Nicolas Sarkozy, tá russar høvdu boðað frá, at teir góvust við álopunum í Georgia. Tá hevði Sarkozy verið í Moskva, men tá hann seinni kom til Tblisi, fekk hann at vita, at Georgia er ikki til reiðar at lata russum tey umstríddu økini Suðurossetia og Abkhasia.

Tað er greitt, at russiska leiðslan vildi hava nakrar broytingar í avtaluna, áðrenn Dmitrij Medvedev, forseti, vildi góðtaka hana. Millum annað segði tann upprunaliga avtalan, at Russland og Georgia skuldu tingast um støðuna hjá Suðurossetia, men tað bleiv strikað eftir kravi frá russum. Nú sigur avtalan, at altjóða samrøður um trygdina í Suðurossetia og Abkhasia.

Georgiski forsetin, Mikhail Saakasjvili., gjørdi í gjár greitt, at Georgia fer ikki at lata Suðurossetia og Abkhasia frá sær. Sambært forsetanum vónar Georgia, at altjóða samráðingarnar fara at hava vbið sær, at teir russisku hermenninir skulu virka sum friðarvarðveitandi hermenn í teimum báðum økjunum.

# Sannleikin kundi givið Hillary sigurin

**Høvdu veljararnir í Iowa vitað um ótrúskapin hjá John Edwards undan uppstillingarvalinum har, hevði Hillary Clinton vunnið demokratisku uppstillingina**

Tað var í samrøðu við sjónvarpið ABC seinasta fríggjadag, at fyrrverandi forsetavalevnið hjá demokratunum í USA, John Edwards, viðgekk, at hann hevði verið konu síni ótrúgvur.

Nú vil ein av fremstu ráðgevunum hjá Hillary Clinton vera við, at høvdu veljararnir í statinum Iowa vitað sannleikan um Edwards, áðrenn demokratiska uppstillingarvalið har var, hevði Hillary Clinton vunnið í Iowa.

- Eg eri rættiliga vísur í, at vit høvdu vunnið í Iowa, og at vit síðani høvdu vunnið alla uppstillingina, sigur Howard Wolfson við CNN.

Barrack Obama vann demokratiska uppstillingarvalið í Iowa. Hann fekk 37,5 prosent av atkvøðunum. John Edwards fekk 29.7 prosent og Hillary Clinton 29,5 prosent. Howard Wolfson vísir á, at John Edwards og Hillary Clinton stríddust um teir somu veljararnar.

Politiskir eygleiðarar í USA siga, at orðini hjá Wolfson kunnu elva til split í demokratiska flokkinum millum viðhaldsfólkini hjá Hillary Clinton og Barrack Obama.



*John Edwards viðgekk ótrúskap*
*Mynd: Polfoto*

## STUTT SAGT

### Sjáldan uttandura

Meksikanski Manuel Uribe, sum hevur havt tann ivasama heiður at vera heimsins tyngsti maður, var fyrradagin uttan fyri hús síni, og hetta var fyrstu ferð í seks mánaðir, at hann var uttandura. Tann fyrsta dagin uttandura nýtti hann høvi til at vitja eitt vatn har norðuri í Meksiko. Tað var tó lættari sagt enn gjørt, tí Manuel Uribe rúmast ikki í einum vanligum bili, so hann bleiv fluttur við vøruvogni, skrivar AP-tíðinmdastovan.

Manuel Uribe vigaði fyrr umleið 500 kilo. Men eftir at hava klænkað seg er hann nú komin niður á 310 kilo. Hansara mál er at fáa vektina niður á 250 kilo, og hann væntar eisini at røkka málinum, skrivar AP.



*Manuel Uribe hevur vigað eitt hálvt tons*
*Mynd: AP*

### Læra seg jarðhita í Grønlandi

Joseph Parry, sum er forsætisráðharri í tí lítla oyggjarríkinum St Kitts og Nevis, sum er í Karibiska havinum, er á veg til Íslands at kanna, hvussu íslendingar fáa nyttu burtur úr hitanum í jørðini. Tað er íslendska stjórnin, sum hevur boðið honum hagar, og í ferðsalagnum eru eisini ídnaðarráðharrin og ein embætismaður, og í Reykjavík skulu teir hitta Geir H. Haarde, forsætisráðherra og Össur Skarphéðinsson, iðnaðarráðharra, eins og teir skulu vitja orkuverk, sum brúka jarðhita.

Felagsskapurin hjá teimum amerikonsku londunum og menningarstovnurin hjá ST stuðla ætlanini um at brúka jarðhita í St. Kitts og Nevis, skrivar Morgunblaðið.



*Joseph Parry skal kanna jarðhita í Íslandi*
*Mynd: AP*